# GERÐABÓK

**Dato: 21. februar 2013 kl. 17.30**
**Stað: Býráðssalurin**
**Málsnr: 17/13-27/13**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Jógvan Arge
Elin Lindenskov
Helena Dam á Neystabø
Sigrún Mohr
Tróndur Sigurdsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Sjúrður Olsen
Jákup Dam
Marin Katrina Frýdal

**LUTTÓKU IKKI:**
Bjørghild Djurhuus vegna forfall.

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**LUTTÓKU EISINI:**
Ingunn Eiriksdóttir

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**17/13** **<u>2013-0175</u>**

**<u>Mál beind í nevndir</u>**

**Býráðið 21. februar 2013:** Tikið til eftirtektar.

**18/13** **<u>2013-0143</u>**

**<u>Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2013</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2013 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 21. februar 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

**19/13** **2013-0379**

**Fundarskipan fyri vinnunevndina**

**Fundarskipan fyri**
**Vinnunevndina**
**(NEVNDARARBEIÐI)**

**xx.xx.2013**

**MANNING OG MÁLSØKI**

**§ 1**

**1. petti.** Í kommunustýrisskipanini eru reglur um manning og málsøki vinnunevndarinnar ásettar í 5. parti, 27. grein, og reglur um íleggingararbeiði ásettar í 3. parti, 11. grein, og eru tær endurgivnar aftast.

**FUNDIR VINNUNEVNDARINNAR**

**§ 2**

**1. petti.** Fundir nevndarinnar eru fyri afturlatnum hurðum.

**§ 3**

**1. petti.** Á fyrsta nevndarfundi í valskeiðinum skipar nevndin seg við formanni og næstformanni. Fyri at val skal verða bindandi krevst, at nevndin er fullmannað.

**§ 4**

**1. petti.** Á seinasta vanliga nevndarfundi í álmanakkaárinum ásetur nevndin, nær vanligir fundir verða í komandi ári, og hvar hesir verða hildnir.
**2. petti.** Heldur nevndarformaðurin ella ein meiriluti av nevndarlimum tað vera neyðugt, verður boðað til eykafundar í nevndini.

**§ 5**

**1. petti.** Nevndarlimir hava skyldu at møta á nevndarfundum. Ber ikki til hjá limi at koma á fund, boðar hann formanninum frá, áðrenn fundurin byrjar.
Nevndarformaðurin ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.
**2. petti.** Nevndarformaðurin kann geva øðrum persóni - umframt kommunustjóra, havnarmeistara og/ella fundarskrivara - atgongd, um tað er ynskiligt til tess at fáa meira at vita um málið.
Stjórarnir hava atgongd eftir tørvi.
**3. petti.** Á hvørjum fundi verður skrivað í gerðabókina, hvørjir limir ikki vóru til staðar, og nær limir koma.
**4. petti.** Noyðist limur at fara av fundi, skal hann boða formanninum frá, og verður ført í gerðabókina, nær limur fer.

**FUNDARSKRÁ**

**§ 6**

**1. petti.** Nevndarformaðurin skipar fyri, at fundarskrá verður send limunum og borgarstjóranum í seinasta lagi 3 dagar frammanundan, at vanligur fundur skal verða. Formaðurin fyrireikar fundin.
**2. petti.** Um nevndarlimur í seinasta lagi 8 dagar framman undan vanligum fundi skrivliga hevur biðið um viðgerð av einum máli, setir nevndarformaðurin hetta mál á skránna.

## INNLIT

**§ 7**

**1. petti.** Tá eitt mál er sett á fundarskránna til ein vanligan fund, skal hetta lýsast í stuttum, styðjað við møguligum tilmæli. Neyðugt tilfar, sum greiðir nærri frá málinum, skal - um slíkt ikki longu er sent limunum - vera til taks á kommunuskrivstovuni í minst 3 gerandisdagar framman undan fundinum. Eitt yvirlit yvir málini skal samstundis vera til skjals.
**2. petti.** Trúnaðartilfar, sum sent er limum saman við fundarskrá ella flýggjað út á fundi, skal latast inn aftur eftir nýtslu.
**3. petti.** Samstundis sum boðað verður til eykafundir í nevndini, letur nevndarformaðurin í so stóran mun sum gjørligt nevndarlimirnar vita, hvørji mál skulu viðgerast á fundinum.
**34. petti.** Nevndarlimur, ið hevur tørv á at fáa upplýsingar og tekniskan stuðul frá kommunalu fyrisitingini í sambandi við málsviðgerðina, fær hesa við at venda sær til kommunustjóran.

## VIÐTØKUFØRI

**§ 8**

**1. petti.** Nevndin er viðtøkufør, tá ið í minsta lagi 3 av nevndarlimunum eru á fundi.

## FUNDARLEIÐSLA

**§ 9**

**1. petti.** Nevndarformaðurin, og um honum berst frá, næstformaðurin leiðir fundirnar, stýrir orðaskiftinum og ansar eftir, at fundirnir fara sømiliga fram. Hann leggur fram fundarskrá og ger av, hvussu teir spurningar, atkvøtt verður um, skulu verða orðaðir.
**2. petti.** Limirnir eiga at lýða avgerðir formansins, tá ið tað snýr seg um at halda neyðugt fundarskil. Er limur 2 ferðir á sama fundi biðin um at fara siðiliga fram, kann formaðurin nokta honum at fáa orðið aftur á fundinum.
**3. petti.** Um so er, at limur ikki ger eftir boðum formansins, tá ið hann hevur tikið orðið frá honum, ella óskil kemur í, kann formaðurin leggja niður fundin, ella um neyðugt slíta fundin.
**4. petti.** Uppskot, sum koma fram undir orðaskiftinum, verða latin formanninum.

## FRAMLØGA AV MÁLUM

**§ 10**

**1. petti.** Nevndarformaðurin ger av, í hvørji raðfylgju málini koma til viðgerðar, og hann kann víkja frá raðfylgjuni á fundarskránni.

## GEGNI

**§ 11**

**1. petti.** Um viðurskiftini eru so, at ivi kann vera um gegni (habilitetin) hjá einum limi, skal hann siga formanninum frá hesum. Eisini kann ein limur reisa spurningin um gegni hjá øðrum limi.
**2. petti.** Nevndin ger av við atkvøðugreiðslu, um eitt mál er slíkt áhugamál hjá einum limi, at hann ikki eigur at taka lut í málsviðgerðini. Um so er, at nevndin ger av, at limur er ógegnigur, skal limurin fara av fundinum, meðan málið verður viðgjørt og avgreitt. Limur kann tó vera við at viðgera egnað gegnið.
Tiltakslimur hjá nevndarlimi eigur at fáa fundarboð, um nevndarlimur gerst ógegnigur.

**3. petti.** Hevur tiltakslimur ikki fingið fundarboð í tí føri, nevndin ger av, at limur er ógegnigur, kann málið verða flutt til næsta fund, uttan so at 3 av teimum møttu nevndarlimunum eru ímóti, ella um málið ikki tolir at bíða.

**ATKVØÐUGREISLA**
**broytingar- og eykabroytingaruppskot**
**§ 12**

Nevndarlimir kunnu bert taka lut í atkvøðugreiðslum nevndarinnar, um teir persónliga eru til staðar, meðan hesar fara fram.

**§ 13**

**1. petti.** Atkvøðugreiðsla fer fram við at rætta hondina upp. Er atkvøðugreiðslan eftir formansins tykki ógreið, letur hann nevndina atkvøða av nýggjum.
**2. petti.** Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeirluta, um ikki annað er fyriskipað í lóggávuni. Eitt uppskot er samtykt, tá ið fleiri atkvøður eru fyri enn ímóti. Standa atkvøðurnar á jøvnum, er uppskotið fallið.
**3. petti.** Heldur formaðurin, at allir limir eru samdir, kann hann gera kunnugt, at málið er samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Mælir limur tá í somu løtu ímóti, verður tó vanlig atkvøðugreiðsla.
**4. petti.** Nevndarlimur kann ikki sleppa sær undan ábyrgd við ikki at greiða atkvøðu.
**5. petti.** Avgerð, sum nevndin hevur tikið, kann ikki á sama fundi verða broytt, uttan so at allir limir, ið vóru á fundi, tá avgerðin varð tikin, eru samdir um hetta.
**6. petti.** Nevndarlimur kann sambært § 32 í kommunustýrislógini, áðrenn ein nevndaravgerð verður sett í verk, krevja, at málið verður lagt fyri býráðið til avgerðar.

**GERÐABÓKIN (O.A.)**
**§ 14**

**1. petti.** Avgerðir nevndarinnar verða á fundinum skrivaðar í gerðabókina av fundarskrivaranum. Formaðurin sigur, hvat skrivast skal.
**2. petti.** Limur kann krevja sína serstøðu í stuttum skrivaða í gerðabókina. Snýr tað seg um mál, ið skulu sendast til annan myndugleika, kann hann eisini krevja, at myndugleikin verður kunnaður um, hvat skrivað er í gerðabókina.
**3. petti.** Formaðurin ansar eftir, at allar nevndarsamtyktir verða førdar í gerðabókina, og at henda nágreiniliga endurgevur, hvussu atkvøðugreiðslan í hvørjum máli sær fór fram og lýsir hvørjir limir, ið atkvøddu fyri ella ímóti ella ikki greiddu atkvøðu.
**4. petti.** Tá fundur er lokin, verður gerðabókin lisin upp og undirskrivað av nevndarlimunum, sum hava verið á fundinum. Limirnir kunnu ikki við at vísa til atkvøðugreiðslu sína ella av øðrum orsøkum bera seg undan at skriva undir gerðabókina.

**VIÐVÍKJANDI FATAN AV HESI FUNDARSKIPAN**
**§ 15**

Limir hava skyldu til at halda seg til avgerð formansins viðvíkjandi spurningum um, hvussu tað, ið ásett er í hesi fundarskipan, skal skiljast. Málið kann tó leggjast fyri nevndina á næsta fundi.

**FUNDARSKIPANIN**
**§ 16**

**1. petti.** Henda fundarskipan kemur í gildi beinanvegin, hon er góðkend av býráðnum.

**2. petti.** Broytingar og ískoyti til hesa fundarskipan kunnu tó verða góðkend av nevndini, uttan at málið verður lagt fyri býráðið aftur, sbr. § 29, stk. 3 í kommunustýrislógini.

**Sambært § 1, 1. petti:**

**Úr 5. parti í kommunustýrisskipanini**
**§ 27**

**Vinnunevndin**

**1. petti. Vinnunevndin** hevur 5 limir.

**2. petti**. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:

1. Tórshavnar havn
2. Smábátahavn
3. Vinnubygningar og vinnuøki
4. Oljuvinnu
5. Fiskivinnu
6. Ferðavinnu
7. Cruisevinnu
8. Handils- og tænastuvinnu
9. Vinnunýskapan
10. Vinnustrategi
11. Hýruvognsloyvi.

**3. petti.** Nevndin fyrisitur bíðilistar til pláss í smábátahavnum og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

**4. petti.** Nevndin fyrisitur býráðsins vegna peningaviðurskiftum og roknskaparhaldi hjá vinnuhavnum og smábátahavnum samsvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi roknskaparreglum og reglum viðvíkjandi fyrisiting av havnum o.ø.

Roknskaparhaldið hjá vinnuhavnum og smábátahavnum skal haldast hvørt sær.

Loyvt er ikki at rinda møguligt hall av rakstri av smábátahavnum v.m. av inntøkum frá vinnuhavnum.

**Vinnunevndin 4. februar 2013:** Vinnunevndin mælir býráðnum at samtykkja uppskotið til fundarskipan.

**Býráðið 21. februar 2013:** Einmælt samtykt.

**20/13** **2010-1271**

**Gøtunavn til útstykking av matr. nr. 1362a, síðuvegur frá Blómubrekku**

Gøtunavnanevndin hevur fingið áheitan frá býarskipanardeildini um at finna eitt nýtt navn til útstykkingina av matr. nr. 1362a, Tórshavn. Útstykkingin er á nýggjum síðuvegi frá Blómubrekku.

**Gøtunavnanevndin 18. desember 2012:** Nevndin mælir til, at navnið verður *Baraldsgøta*.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 6. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 21. februar 2013:** Einmælt samtykt.

**21/13** **2012-1816**

**Uppskot um navn til vatn/tjørn í Hoyvík**

Soljóðandi skriv er komið frá einum borgara í Hoyvík:

"Í Hoyvík, har Skaðagil og Djúpagil koma saman, er í dag ein tjørn. Henda tjørn var upprunaliga ein vatnbrunnur hjá hoyvíkingum. Í dag er hetta ein vøkur tjørn, sum dregur nógv fuglalív til sín, bæði dunnur og annan fugl, millum annað hevur eitt svanapar ungar har nú á 3. ári.

Tað eg veit hevur hendan tjørn, ella vatn, onki navn, eg havi hoyrt okkurt barn kalla hana Hoyvíkstjørn.

Eg vil hervið loyva mær at skjóta upp, at tjørnin fær navnið Giljatjørn ella Giljavatn."

**Gøtunavnanevndin 25. oktober 2012:** Nevndin mælir til, at navnið verður Giljatjørn.

**Ískoyti:**
Av tí at talan er um eitt staðarnavn heldur enn gøtunavn, varð Staðarnavnanevndin biðin um viðmerkingar. Staðarnavnanevndin umrøddi spurningin á fundi 18. januar 2013, og niðurstøðan var: "Nevndin heldur einki vera at finnast at navnaforminum "Giljatjørn". Viðmerkt varð, at merkingarliga er tann prototypiski munur millum "tjørn" og "vatn", at tjørn er ofta minni og grynri enn vatn.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 6. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 21. februar 2013:** Einmælt samtykt.

**22/13** **<u>2012-1900 KF</u>**

**<u>Broyting av byggisamtykt við Sundsvegin/Sortudýki og skipan av økinum við Kringvarpið, Norðurlandahúsið og nýggja Musikkskúlan</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at fleiri mál í seinasta hava verið undir viðgerð við niðasta part av Sundsvegnum og við Sortudýki, metir umsitingin at tað er rættast at samla alt hetta í eitt mál, soleiðis at býarskipanarliga viðgerðin verður fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, og soleiðis at eitt betri yvirlit fæst yvir alt økið, og framtíðar nýtsluna av økinum. Talan er um málini, umsóknir frá Oddmar Færø (2012-0231), Annu Mohr (2011-1565) og P/F Búrøkt (2011-1404) um broytingar av byggisamtykt, broytingar av Sundsvegnum (2008-1294 og 2012-0370) og ætlanir um útbygging av Kringvarshúsunum (2004-2487) og bygging av nýggjum musikkskúla (2009-3106).

**Stutt lýsing av umsóknum og ætlanum í økinum:**
Oddmar Færø (2012-0231) ynskir at fáa broytt byggisamtyktina fyri ognina matr. nr. 1457a, Tórshavn, sum liggur vestan fyri Sundsvegin frá D1 øki til A3-øki.

Anna Mohr (2011-1565) ynskir at fáa broytt byggisamtyktina fyri ognina matr. nr. 1454a, Tórshavn, sum liggur vestan fyri Sundsvegin frá D1 øki til A-økið, t.d. A3-øki.

P/F Búrøkt (2011-1404) ynskir at fáa broytt byggisamtyktina fyri part av ognini, matr. nr. 1401a, sum liggur eystan fyri Sundsvegin, frá D1 til blandaða

íbúðabygging. Umsóknin nevnir ikki ítøkiliga hvat broytingin skal verða, men umsitingin metir hetta svara til A3-øki.

Við Sortudýki hevur Kringvarpið (2004-2487) nú í fleiri ár havt ymiskar ætlanir um útbyggingar av teirra bygningi á matr. nr. 1452c. Nú fyriliggur ein meira ítøkilig ætlan um útbygging. Umsitingin hevur havt fund við KvF hin 22. aug. 2012, har teir kunnaðu um útbyggingarætlan teirra.

Býráðið hevur samtykt at fara undir bygging av nýggjum musikkskúla (2009-3106) í økinum eisini, á matr. nr. 1409 og 1453a.

Í sambandi við yvirskipaði ferðsluviðurskifti í sambandi við nýggjan innkomuveg til Havnar, kemur Sundsvegurin at verða ein týðandi partur av ferðslusambandinum millum Norðara Ringveg og nýggja innkomuvegin. Býráðið avgjørdi tí 14. des. 2011 at lata gera uppskot til dagføring av Sundsvegnum (2008-1294 og 2012-0370).

At enda hevur býráðið eisini í sambandi við fíggjarætlanarviðgerðina fyri 2011 (2010-2717), avsett pening til at fáa gjørt eina ætlan fyri frílendi til borgaran á økinum við Hoydalsá. Umsitingin hevur síðani arbeitt við at gera eina skipanarætlan fyri lendið í økinum, soleiðis at tey verða borgarunum í býnum til bestu náttúru- og frítíðarupplivingar, við íðkanarmøguleikum og rørslufremjandi tilboðum (2012-0881). Eisini gjørdi kommunan í 2009 eina avtalu við Innlendismálaráðið um partar av økinum, við tí fyri eyga at skapa Føroya størsta, samanhangandi fríøki líka frá Boðanesgjógv niðan í Villingadal.

**Býarskipanarlig viðurskifti:**
Upprunin til fríøkið fram við Hoydalsá er frá 1930´unum, tá farið varð undir eina skipan við urtagarðsstykkjum. Í 1972 samtykti býráðið at leggja eitt stórt samanhangandi øki, líka frá Boðanesi niðan í Villingadal, út sum Frílendi D1-øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn, at nýta til almenning, náttúrufriðing og mentunarlig endamál. Í 1983 staðfesti Yvirfriðingarnevndin friðingarlinjur í økinum, og í 1995 var serstøk samtykt lýst á økið, um fríøkir, traðarbrúk og gróðursetingar.

Økið kring Kringvarpshúsið og Norðulandahúsið er í almennu byggisamtyktini lagt út sum C2-øki, ætlað til miðstaðarendamál, serstakliga stovnar, framsýningahallir, tónleikahallir og aðrar mentunarligar stovnar Ein partur av ognini hjá Kringvarpinum, er skógarfriðaður, og er gjørd ein serlig, skrivlig avtala um hetta økið millum Skógfriðingarnevndina og Kringvarpið.

Fyri ognirnar hjá kommununi, sum liggja eystan fyri Norðurlandahúsið, var gjørd ein serlig avtala millum kommununa og Norðurlandahúsið – eitt sokallað friðingarbræv. Norðurlandahúsið og kommunan hava viðgjørt hesa avtalu í sambandi við ætlanina at byggja Musikkskúla har, og hevur Norðurlandahúsið tikið undir við ætlanini.

Hinar ognirnar vestan fyri Sundsvegin, sum hetta málið fevnir um – t.e. matr. nr. 1453b, 1454a og 1457a, eru lagdar út sum frílendi D1-øki í almennu byggisamtyktini. Sama ger seg galdandi fyri matr. nr. 1401a, sum liggur eystan fyri Sundsvegin, og er beinleiðis partur av stóra frílendinum fram við Hoydalsá.

**Ferðsluviðurskifti viðurskifti v.m.:**
Ongin ivi er um, at framtíðar leikluturin hjá Sundsvegnum, sum mest týðandi parturin av ferðslusambandinum millum Norðara Ringveg og nýggja innkomuvegin, kemur at føra til munandi vøkstur í ferðsluni eftir Sundsvegnum. Framskrivingar eru gjørdar í sambandi við viðgerðina av málinum um nýggjan innkomuveg (2001-0407), sum stuðla uppundir hetta.

Tað er heldur ongin ivi um, at útbyggingarætlanin hjá Kringvarpinum, har ætlanin er at savna útvarp og sjónvarp í Sortudýki, fer at føra til munandi meira ferðslu til bygningin og tørv á parkeringsplássum, ikki bert fyri starvsfólk, men eisini í sambandi við sendingar við áskoðara-/áhoyraraluttøku. Sama ger seg galdandi fyri Musikkskúlan, har fleiri hundrað næmingar koma og fara frá undirvísing dagliga. Samstundis er tað ein trupulleiki, at Norðurlandahúsið langt frá hevur nøktandi parkeringsumstøður til sítt vanliga virksemi, og heldur ikki hevur møguleika at útbyggja meira til eitt nú parkeringspláss. Neyðugt er tí, at ein framtíðar ætlan fyri hetta økið, letur upp fyri at loysa hesar trupulleikar, tá virksemið í økinum verður so nógv økt.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**
Ein týðandi munur millum D1-økið vestan fyri Sundsvegin (t.e. matr. nr. 1453b, 1454a, 1457a og part av 1458c) og D1-økið eystan fyri Sundsvegin (t.e. matr. nr. 1401a, 1401b, 1470bs og 1470m) er, at matriklarnir vestan fyri Sundsvegin liggja atskildir frá stóra D1-økinum fram við Hoydalsá, og liggja tí sum eitt sjálvstøðugt og náttúrliga avmarkað D1-øki uppat C2-økinum við Norðurlandahúsið, Kringvarpshúsið og komandi musikskúlan, meðan matr. nr. 1401a, eystan fyri Sundsvegin, er beinleiðis og samanhangandi partur av stóra frílendinum fram við Hoydalsá.

Ognirnar vestan fyri Sundsvegin, matr. nr. 1457a hjá Oddmar Færø (2012-0231) og matr. nr. 1454a hjá Annu Mohr (2011-1565) eru í dag ábygdar í ein ávísan mun og liggja í einum náttúrliga avmarkaðum øki, sum av Sundsvegnum er avskorið frá restini av samanhangandi D1 øki fram við Hoydalsá.

Her metir umsitingin, at grundarlag er fyri at broyta almennu byggisamtyktina soleiðis, at økið kring verandi sethús á matr. nr. 1457a hjá Oddmar Færø (2012-0231), matr. nr. 1454a hjá Annu Mohr (2011-1565) og matr. nr. 1453b hjá Jákup Garðshorn Mikkelsen kann broytast til A1-øki. Somuleiðis verður mett, at tann lítli parturin av matr. nr. 1458c hjá Ingu og Sámal Jákup Joensen, sum er D1-øki, kann broytast til A3, eins og restin av hesum matriklinum. Tó soleiðis, at fyri allar hesar matriklar er galdandi, at økið verður tillagað móti Sundsvegnum,

samsvarandi uppskoti til dagføring av Sundsvegnum, sum tekniska nevnd, byggi- og býarskipanarnevndin, fíggjarnevndin og býráðið skulu taka støðu til í næstum.

Restina av ognini matr. nr. 1454a hjá Annu Mohr (2011-1565), verður mælt til at broyta til C2-øki, sum gevur møguleika fyri framhaldandi bygging til ymisk mentunarlig endamál í økinum, og fyri at fáa eina varandi og framtíðartryggjaða loysn á atkomu- og parkeringsviðurskiftunum til verandi og komandi mentunarstovnar í økinum.

Samstundis verður mælt til, í serstakari byggisamtykt, at gera neyvari ásetingar um m.a. skipaða inn- og útkoyring móti Sundsvegnum og Norðara Ringvegi frá bæði verandi sethúsum og mentunarbygningum í økinum, soleiðis at ferðslan til og frá hesum økinum ikki kemur at darva framtíðar høvuðsferðslu á Sundsvegnum og Norðara Ringvegi.

Í sambandi við útbyggingarætlanirnar av Kringvarpshúsinum, keypti KVF í 2006 góðar 3000 $m^2$ av skógfriðaðum lendi av matr. 1457a, at leggja saman við 1452c. Í hesum sambandi gjørdi KVF avtalu við Skógfriðingarnevndina um bygging her við ávísum treytum. Fyriliggjandi útbyggingarætlan hjá KVF tekur hædd fyri nevndu avtalu, og er ætlan teirra ikki at byggja inni á skógfriðaða økinum. Umsitingin mælir tí frá at broyta ásetingarnar fyri tann partin av matr. nr. 1452c, sum er skógfriðað øki, og at hesin parturin av matr. nr. 1452c tí framhaldandi verður frílendi D1-øki.

Ognin hjá P/F Búrøkt (2011-1404) matr. nr. 1401a, liggur uppat samanhangandi D1 økinum fram við Hoydalsá, og ein stórur partur liggur harumframt innan fyri tí av friðingarmyndugleikunum ásettu friðingarlinjuna og innanfyri serstøku byggisamtyktina fyri Hoydalsá. Eigarin hevur søkt um loyvi at fremja tætta bústaðarbygging her.

Umsitingin metir, at hetta økið ikki kann metast sum eitt serstakt og náttúrliga avmarkað økið á sama hátt sum økið vestan fyri Sundsvegin, men at tað tvørturímóti er ein samanhangandi partur av stóra D1-økinum líka frá Boðanesgjógv niðan í Villingadal. Hetta stóra náttúruøki er náttúrliga avmarkað av Norðara Ringvegi móti suðuri, av Sundsvegnum og verandi byggingum móti vestri, av Skræddaragøtu og verandi byggingum móti norðuri, og av Flatavegnum móti vestri og verandi byggingum móti vestri, á ovasta partinum av økinum.

Umsitingin metir, at tað er í andsøgn við ætlanina um eitt slíkt stórt, samanhangandi náttúruøki, sum býráðið í 1972 tók avgerð um, og sum býráðið í 1995 gjørdi serstaka byggisamtykt fyri, um núverandi býráð fer at taka burturav hesum stóra og náttúrliga avmarkaða fríøkinum, at gera um til byggiøki. Hetta vil somuleiðis verða í andsøgn við tí avtalu, sum kommunan gjørdi við Innlendismálaráðið í 2009, um at tær ognir, sum landið eigur í hesum økinum, verða partur av Føroya størstu frílendisætlan. Býráðið hevur eisini í 2012 bæði keypt onkra privata ogn í náttúruøkinum fram við Hoydalsá, og gjørt eina

makaskiftisavtalu við landið í sambandi við økið til Skúladepilin í Marknagili, har kommunan fær fleiri landsognir í hesum stóra fríøkinum fram við Hoydalsá, júst við tí fyri eyga, at skapa karmarnar fyri at fáa eitt stórt samanhangandi náttúruøki.

Eisini metir umsitingin, at um tað fyrst verður givið loyvi til at broyta einstakar matriklar inni í hesum náttúrliga avmarkaða økinum til byggiøki, hevur býráðið ikki grundarlag fyri at nokta øðrum slíkum umsóknum í framtíðini, og er tí stórur vandi fyri, at ætlanin frá 1972 við hesum stóra og serliga náttúruøkinum fer fyri skeyti.

Umsitingin mælir tí frá at ganga umsóknini frá eigaranum av matr. nr. 1401a á møti, um at broyta økið til A3-øki, men at økið framhaldandi verður verandi partur av náttúrliga avmarkaða D1-økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til:
1. at byggisamtyktin fyri ognirnar vestan fyri Sundsvegin, matr. nr. 1453b og 1457a verður broytt til A1-øki og fyri matr. nr. 1454a verður broytt partvís til A1 og partvís til C2-øki, sí kort.
2. at parturin av matr. nr. 1458c vestan fyri Sundsvegin, sum er D1-økið, verður broytt til A3-øki, eins og restin av matriklinum, og verður fevnt av verandi serstøku byggisamtykt fyri 1458a, 1458b og 1458c.
3. at byggisamtyktin fyri skógfriðaða partin av matr. nr. 1452c ikki verður broytt.
4. at byggisamtyktin ognirnar eystan fyri Sundsvegin, matr. nr. 1401a og 1401b, ikki verður broytt.
5. at gjørd verður ein serstøk byggisamtykt fyri økið vestan fyri Sundsvegin (t.e. matr. nr. 1409, 1410d, 1452c, 1453a, 1453b, 1453c, 1454a, 1454d og 1457a), tá útbyggingarætlanin hjá Kringvarpinum og musikkskúlin hjá kommununi, eins og linjuføring fyri dagføring av Sundsvegnum, eru komin í eina fasta legu, við atliti til m.a. framtíðartrygging av atkomuviðurskiftum og økisparkering v.m. sambært omanfyri standandi viðmerkingum frá umsitingini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. september 2012:** Ein meiriluti: Levi Mørk, Jan Christiansen, Elin Lindenskov og Bogi Andreasen samtyktu at taka undir við 1, 2, 3 og 5 og beina málið í býráðið.

Eisini samtykti meirilutin at biðja um at umsitingin ger yvirlitskort yvir ognarviðurskiftini og friðingarlinjur í økinum at leggja fyri nevndina aftur á næsta fundi.

Ein minniluti: Jákup Símun Simonsen tekur undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 4. september 2012:** Kunnað varð um málið.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt at taka undir við punkt 1, 2, 3 og 5.

**Ískoyti**
Umsitingin leggur fram yvirlitskort sambært samtykt frá 3. september 2012.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin vísir til tilmælið til fundin 3. september 2012, pkt. 4.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. oktober 2012:** Ein meiriluti: Levi Mørk, Bogi Andreasen og Jan Christiansen mælir til at matr. nr 1401a og 1401b frá friðingarlinjuni til Sundsvegin verður broytt til A1.

Ein minniluti: Elin Lindenskov og Jákup Símun Simonsen taka undir við tilmælinum.

Ein samd nevnd beinir málið í býráðið.

**Býráðið 1. november 2012:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og einari ímóti..

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddi: Marin Katrina Frýdal

Greiddu ikki atkvøðu: Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen og Elin Lindenskov.

**Ískoyti**:
Broytingin í byggisamtyktini er nú kunngjørd og hevur ligið alment frammi. Seinasta freist at mótmæla broytingini var 2. januar 2013.

Tá ið kærufreistin var farin, var eitt broytingaruppskot móttikið. Hetta er frá Skogfriðingarnevndini.

Í sambandi við byggisamtyktarbroytingina heitir Skógfriðingarnevndin á Tórshavnar kommunu um at fáa í lag almenna gongufarleið frá Sundsvegnum, yvirav íbindingini við Birnugøtu, og tvørtur um m.a. skógfriðaðu ognirnar ávíkavist matr. nr. 1457a og 1452c, Tórshavn, og yvir til ávíkavist matr. nr. Kringvarpsbygningarnar og Norðurlandahúsið, soleiðis sum víst á hjáløgdum kortskjali.

Fundur hevur verið við eigararnar av matr. nr. 1457a, Tórshavn, Anna Maria og Oddmar Færø og umboð fyri Skógfriðingarnevndina. Semja var um at leggja

gøtuna tætt við markið ímóti matr. nr. 1458a, Tórshavn, sum Sámal Jákup Joensen eigur. Hetta hevur við sær, at gøtan kemur at ganga ígjøgnum ognina matr. nr. 1458c, Tórshavn, sum Sámal Jákup Joensen eisini er eigari av. Tí er eisini neyðugt at taka upp samráðingar við hann í sambandi við nágreiniligu staðsetingina av gongufarleiðini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at taka undir við broytingaruppskotinum og nágreina staðsetingina av gongufarleiðini í eini serstakari byggisamtykt fyri økið vestan fyri Sundsvegin. (gerð av serstakari byggisamtykt fyri økið vestan fyri Sundsvegin samtykt av býráðnum 1. november 2012).

**Tekniska nevnd 6. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

Helena D. á Neystabø og Marin Katrina Frýdal vóru ikki við til hetta málið.

**Býráðið 21. februar 2013:** Helena Dam á Neystabø og Marin Katrina Frýdal vóru ikki við til at við gera hetta málið.

Einmælt samtykt.

**23/13** **2013-0172**

**Viðv.: Góðkenning av viðtøkum fyri Eigarafelagið við Myllutjørn.**

**Málslýsing - samandráttur**
Eigarafelagið biður um góðkenning av viðtøkum fyri Eigarafelagið við Myllutjørn.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla fíggjarnevndini og býráðnum til at góðkenna viðtøkurnar fyri Eigarafelagið við Myllutjørn.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 21. februar 2013:** Einmælt samtykt.

**24/13** **2007-0625**

**Eysturskúlin – høvuðsumvæling**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Húsaumsitingin er farin í holt við at umvæla Eysturskúlan. A og B lonirnar eru gjørdar, og nú vanta C, D og E lonirnar.

Húsaumsitingin saman við arkitektinum hava verið á fundi við leiðsluna í skúlanum fyrr í ár. Leiðslan ynskti at E lonin varð gjørd fyrst, tí tey mettu hesa verða mest átroðkandi. Nøkur vindeygu eru skrúvaðið føst fyri ikki at detta úr. Havandi í huga at hesi eisini virka sum fluktvegir út á takið, er skilagott at gera hetta arbeiðið fyrst.

Sambært fyribils kostnaðarmeting verður hetta arbeiðið mett at koma at kosta uml.10 mill. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at fara undir arbeiðið á E-lonina. Hetta merkir, at aftrat teimum 5 mill. kr,. sum Húsaumsitingin hevur sett av til Eysturskúlan í ár, verður neyðugt at kunna seta 5 mill. kr. av játtanina til konto 82 í komandi ár til Eysturskúlan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Húsaumsitingin hevur heitt á ráðgevan A3 v/Hans Dávid Dam, ark. og biðið hann gera útbjóðingartilfarið fyri C lonina umframt tekjurnar, sum leiðslan ynskti (ikki E lonin hetta er ein misskiljing).

Innboðin lisitatión varð hildin og inn komu 3 tilboð. Tilboðini lógu upp á 12,9, 14,3 og 17,7 mió. kr. Lægstur við kr 12.938.329,00 lá Sp/f Karstin A.Joensen, byggimeistari í Kollafirði. Meting okkara var 12.027.035 mió. kr.

Fyri lítlum ári síðani fingu vit samlað tilboð frá spf ÁTS fyri bygningspartarnar C, D og E, og var hettar upp 20,9 mió. kr. - Fyri bygningspart C + tekjurnar, skuldi hettar givið kr. 12,6 mió. kr.

Ráðgevin hevur mælt til at taka av lægsta tilboðnum. Umsitingin hevur gjørt samlaða kostnaðarmeting, íroknað ókent, prístalsreguleringar, prosjekt, eftirlit og byggileiðsla og mvg, og er samlaði kostnaðurin mettur at blíva kr. 16.633.839,22, (skjal 2007-0625/4).

Upprunaliga varð roknað við at játtanin til hetta arbeiði skuldi verða av konto 82, umsiting av bygningum. Men í samband við fíggjarætlan fyri 2008 var avgjørt at

talan var ikki um vanligt viðlíkahald, men heldur um eina íløgu í dagføring, og var tí avgjørt at játtanin fyri 2008 til hetta arbeiði skal av íløgum fyri 2008.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at tikið verður av lægsta tilboðnum, og at játtaðar verða kr. 16.633.839,22 av íløgum fyri 2008, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2007:** Útsett.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at tilboðið, sum víst verður til í tilmælinum omanfyri, verður fíggjað av íløgum fyri 2008 kr. 13.785.000,00, restupphæddin kr. 2.848.839,22 verða goldnar av konto 82, umsiting av bygningum, skúlamál.

**Mentamálanevndin 2. apríl 2008:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 13.785.000,00 av íløgum fyri 2008.

**Fíggjarnevndin 16. apríl 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 24. apríl 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
C lonin í Eysturskúlanum var liðugt høvuðsumvæld í 2008, sostatt eru A, B og C lonirnar umvældar.
Tá umvælingin av C lonini var liðug, varð í samráð við skúlan avgjørt at bíða eina tíð við framhaldandi umvælingunum, tí skúlin metti, at høvuðsumvælingin órógvar dagliga arbeiðið í skúlanum so mikið, at tørvur var á einum steðgi í eini tvey ár.

Tann tíðin er farin nú, og mælt verður tí til, at høvuðsumvælingin verður tikin upp aftur, og at farið verður í gongd við D lonina.

Ráðgevin metir, at kostnaðurin fyri projekteringina er 314.000 kr. uttan mvg. Við mvg og við at leggja nakað aftrat til óvæntað, verður metti kostnaðurin fyri at projektera liðugt og gera klárt til útboð 370.000 kr.

Gerast skal ein ráðgevarasáttmáli um projektering og eftirlit við høvuðsumvælingini. Ráðgevin, sum tók sær av hesi uppgávu, tá hinar lonirnar vórðu umvældar, hevur neyva vitan um bygningin og verkætlanina sum heild, og tí verður viðmælt, at heimild verður givin at gera sáttmála við hann aftur.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at heimild verður givin at gera sáttmála við ráðgevan, sum tók sær av hesi uppgávu, tá hinar lonirnar vórðu umvældar.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at 370.000 kr. verða játtaðar av konto 4175, Dagføring av skúlum, til projektering av høvuðsumvæling av D lonini í Eysturskúlanum, soleiðis at hetta umvælingarstigið kann bjóðast út.

**Mentamálanevndin 1. desember 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og játta kr. 370.000 av íløguætlanini fyri 2011.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Fundur hevur verið við leiðsluna í Eysturskúlanum um høvuðsumvælingina av D-lonini. Á fundinum greiddi ráðgevin frá umvælingarætlanini, og skúlin hevði møguleika at gera viðmerkingar.

Ráðgevin hevur projekterað og gjørt kostnaðarmeting. Høvuðsumvælingin fevnir í høvuðsheitum um útveggir, máling innan, nýtt linoleum á gólvini, eftirbjálving, bøtta brunatrygd, gardinur, hitaskipan, el-hurðalæsiskipan og goymslurúm til klor, sum verður brúkt í svimjihylinum.

Sambært kostnaðarmeting, sum er í málinum, verður samlaði kostnaðurin kr. 11.572.412,11.

Ætlanin er at fara í gongd við umvælingina í august 2012, og arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 11.572.500 kr. av konto 4175, Dagføring av skúlum, til høvðusumvælingina av D-lonini í Eysturskúlanum

**Mentamálanevndin 13. juni 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**

Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodnari lisitatión. Inn komu fýra tilboð, og var lisitatiónin mikudagin 27. august 2012.

Úrslitið varð:

| Arbeiðstakarar | Tilboð uttan mvg |
|---|---|
| P/f Articon | kr. 7.110.925,00 |
| Sp/f Bjarni Poulsen | kr. 8.373.795,00 |
| Sp/f Karstin A. Joensen | kr. 6.711.394,00 |
| Sp/f Húsavarðartænastan | kr. 7.969.578,00 |

Ráðgevin hevur kannað tilboðini og mælir til at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi kr. 6.711.394,-

Býráðið hevur áður játtað hesar upphæddir til umvælingararbeiðið:

| | |
|---|---|
| 16. des. 2010: | kr. 370.000,00 |
| 28. juni 2012: | kr. 11.572.412,11 |
| Tils. | kr. 11.942.412,11 |

Umsitingin hevur eftirfylgjandi gjørt samlaða kostnaðarmeting fyri alt arbeiðið, íroknað handverkaraútreiðslur, inniklima, projektering, eftirlit, byggileiðslu, prístalsregulering, prosjektumsiting, ókent og mvg, j. nr. 2012-0511/22, og metir, at arbeiðið kann gerast innanfyri áður játtaða fíggjarkarmin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av lægsta tilboðnum, at heimila umsitingini at taka upp samráðingar og gera sáttmála við lægsta tilboðsgevaran, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 5. september 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Høvuðsumvælingin av D-lonini er í gongd, og sambært tíðarætlanini verður arbeiðið at umvæla D-lonina liðugt í mai.

E-lonin er eftir at høvuðsumvæla, og mett verður skilagott, at høvuðsumvælingin heldur fram soleiðis, at tá D-lonin er liðug, kann farast undir umvælingina av E-lonini. Kann hetta arbeiðið fara í gongd í mai-juni, fer tað ikki at órógva skúlagongdina so nógv, tí tá eru próvtøkur. Nám X heldur til í E-lonini, og skúlin

metir, at tað ber til at skipa próvtøkurnar hjá teimum í øðrum hølum í skúlanum, meðan umvælingin fer fram.

Um umvælingin ikki fer í gongd í mai-juni, verður neyðugt at finna onnur høli til Nám X í umvælingartíðini og helst fáa til vega játtan til leiguútreiðslur.

Metti kostnaðurin fyri projektering til liðugt útboð, eftirlit, byggileiðslu, bygningsumvælingar, tilfar, arbeiðsløn, projektumsiting og til óvæntað er 6.824.509 kr. v/mvg à 6,25%. Íroknað hesa upphædd eru eisini útreiðslur til ventilatiónsverk í D-lonini (L41009), sum greitt er frá niðanfyri.

Mett verður skilabest at gera sáttmála við sama ráðgeva, sum hevur havt allar hinar partarnar av høvðusumvælingina av Eysturskúlanum um hendi. Tí verður biðið um heimild at gera sáttmála við hann um projektering og eftirlit við høvðusumvælingina av E-lonini.

Ætlanin er at fara í gongd við umvælingina, tá D-lonin er liðugt umvæld, og ætlanin er, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión.

Viðvíkjandi D-lonini er møguleiki, at verandi ventilatiónsverk verður skift út við eitt nýtt, sum hevur hitaendurvinning við roterandi hitavekslara. Meirkostnaðurin fyri at velja hesa skipan, heldur enn hana, sum er í ætlanini, er 334.687 kr. Men mett verður, at meiríløgan verður afturgoldin í minni orkunýtslu yvir seks ár.

Í íløguætlanini fyri 2013 konta 4175 Dagføring av skúlum eru kr. 2 mió settar av til E-lonina, men roknað hevur verið við eisini at brúka avlop á løgukarminum fyri 2012 til endamálið. Har standa kr. 4,867 mió tøkar, tvs. samlaði løgukarmurin er kr. 6.867.000. Fígging er sostatt tøk á kontu 4175 Dagføring av skúlum til umvælingina av E-lonini og meirkostnaðin fyri annað ventilatiónsverk í D-lonini, í alt kr. 6.824.509.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at heimild verður givin at gera sáttmála við sama ráðgeva, sum hevur havt uppgávuna í sambandi við ymsu lonirnar annars, og at tað av íløgukontu 4175 Dagføring av skúlum verða játtaðar kr. 6.824.509 til høvuðsumvælingina av E-lonini, harav tó kr. 334.687 til ventilatiónsverk í D-lonini (L41009).

**Mentamálanevndin 6. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. februar 2013:** Einmælt samtykt.

25/13 **2012-2345**

**Umsókn um eykajáttan til Venjingarskúlan**

**Málslýsing - samandráttur**
Venjingarskúlin hevur søkt um eykajáttan til tilfar og útgerð til alis- og evnaføði.

Í umsóknini verður víst á, at útgerðin er gomul, slitin og brotin, og at tilfar og útgerð til nýggju lærubøkurnar hjá Skúlabókagrunninum ongantíð er keypt. Í fylgiskrivi til umsóknina verður mett, at kostnaðurin at uppraðfesta tilfarið er 450.000 kr.

Sambært sáttmálanum um býtið av felagsútreiðslum á Føroya Læraraskúla og Venjingarskúlanum, er undirvísingartilfar til fakhølini partur av felagsútreiðslunum, sum verða býttar millum Læraraskúlan og Venjingarskúlan í lutfallinum 60/40. Sostatt er parturin av útreiðslunum til tilfarið og útgerðina til alis- og evnafrøði 40%, og biðið verður tí um eina eykajáttan á 180.000 kr. til tilfar og útgerð til alis- og evnafrøði til Venjingarskúlan.

Fyri undirvísingina í alis- og evnafrøði er umráðandi, at tað tilfar og tann útgerð, sum hoyrir til lærubøkurnar er tøk, og tí verður mælt til at veita Venjingarskúlanum eykajáttan á 180.000 kr.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at veita Venjingarskúlanum eykajáttan á 180.000 kr., og at upphæddin verður játtað av kontu 4201 – Endurgjald til lærlingaútreiðslur.

**Mentamálanevndin 6. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. februar 2013:** Einmælt samtykt.

26/13 **2006-1323 (sí eisini mál nr. 2005-1996 og 2009-1732) EY**

**Høgni Jacobsen: Viðvíkjandi endurgjaldi í sambandi við ognartøku av vegi við Dvørgastíg í Tórshavn.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Málið um ognartøkuna av parti av Dvørgastígi var avgreitt, tá Hægstirættur staðfesti ognartøkuna í 2006. Høgni Jacobsen hevur í sambandi við staðfestingina, í skrivi dagf. 31.mars 2006 til kommununa, gjørt vart við endurgjaldskrav.

Hetta málið um endurgjald hevur sín uppruna í øðrum málum um Dvørgastíg og eru tey hesi:

- Mál nr. 2005-1996
  Viðv. ferðsluviðurskiftunum í Dvørgastígi - parkeringsviðurskifti ísv virki í gøtuni (matr. nr. 789x)
- Mál nr. 2004-1700
  Bjarki Jacobsen vegna Ottar Jacobsen : Viðv. vatn sum rennur frá Dvørgastígi inn í urtagarðin hjá Ottari Jacobsen. Heitir á kommununa um at gera nakað við málið.
- Mál nr. 2004-1005
  Alment innlit í málið matr. 789x viðvíkjandi ognartøku Dvørgastígur - umsókn frá Advokatvirkinum og skriv frá Løgtingsins Umboðsmanni viðv. klagu frá Oddvør Jacobsen
- 2001-2328
  Advokatar Poul Hansen og Jónfinn Thomsen: Viðv. ognartøku av Dvørgastígi
- 1999-1153
  Dvørgastígur yvir í Vættrastígur nýggj kloak
- 1999-0998
  Ottar Jacobsen: Viðvíkjandi ferðsluviðurskiftunum í Dvørgastígi

Í skrivinum, dagf. 31. mars 2006, verður m.a. kravt, at ognartikna lendið verður endurrindað við at kommunan letur annað lendi, eitt nú grundstykki. Í tí sambandinum verður víst til § 20 í býarskipanarlógini. Í øðrum lagi verður kravt endurgjald fyri handilsvirðið á ognini, og at hetta verður sett samsvarandi virðinum á byggilendi.

Víst verður á, at nú kommunan hevur ognartikið part av Dvørgastígi, sum gongur fram við matr. nr. 789n, og 789m, verður eisini kravt, at kommunan yvirtekur restina av vegnum. Í tí sambandinum verður víst til § 14, stk 1, í býarskipanarlógini.

Harumframt verður sett fram krav um, at kommunan rindar endurgjald fyri mist handilsvirði av ognini umframt endurgjald vegna virðisminking av resterandi ogn og endurgjald vegna ampar. At enda verður kravt, at ognartikni vegurin verður settur í stand og at kommunan letur gera hegn og garð fram við vegnum. Í skrivinum verður eisini biðið um fund við kommununa um at fáa avgreitt nevndu spurningar.

Nógv samskifti hevur verið millum Høgna Jacobsen og umsitingina, at fáa greiðu á hvussu ein virðilig loysn kann verða funnin á endurgjaldsspurninginum.

Umsitingin hevur í tí sambandi latið gera ein handlingsplan, ið tekur støði í at ovari partur av Dvørgastígi verður knýttur í Heiðavegin, meðan niðari partur verður knýttur í Varðagøtu. Hetta vil føra við sær, at niðari partur av Dvørgastígi einans skal verða nýttur av matr. nr. 789c, nr. 789e , nr. 789f Tórshavn, meðan restin – tann ovari parturin verður knýttur at eini framtíðar atkomu frá Heiðavegnum, tvørtur um matr. nr. 789n, ið er ogn hjá kommununi. Men av tí at henda ogn í løtuni verður nýtt sum fríøki, er ynskiligt, um tann parturin av Dvørgastígi, ið upprunaliga var ætlaður til veg at binda í Heiðaveg, verður latin kommununi at leggja saman við fríøkinum ella at nýta sum fríøki, soleiðis at fríøki verður báðu megin íbindingina í Heiðaveg. Tað vil siga, at ímillum Dvørgastíg nr. 5 og 7 verður sperra at seta upp soleiðis, at tað ikki verður koyrandi millum ovara og niðara part á Dvørgastígi. Afturfyri verður skotið upp, at kærarin fráfellur nevndu krøv í skrivi til kommununa.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Kommunan kemur undir øllum umstøðum at rinda eitt ávíst gjald fyri ognartøkuna av niðara parti av Dvørgastígi. Eftir sum partarnir ikki kunnu koma ásamt um virðið á ognartikna lendinum, eru ikki aðrir møguleikar enn at velja ein metingarmann.

Tað fyriliggur eingin fíggjarlig meting av teimum krøvum, ið Høgni Jacobsen hevur gjørt vart við. Heldur ikki er nøkur meting gjørd fyri kostnað av arbeiðinum at gera neyðugar ábøtur á Dvørgastíg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at arbeitt verður við at gera semju við Høgna Jacobsen, um at hann letur kommununi restina av Dvørgastígi afturfyri at kommunan fer undir omanfyri nevndu arbeiði, treytað av at kærarin fráfellur nevndu krøv.

Mælt verður eisini til at játta kr. 150.000 av reguleringskontoini at gera eitt skitsuuppskot við kostnaðarmeting av:

- nýggjum atkomuvegi millum Dvørgastíg og Heiðaveg
- fríøki við Heiðavegin
- gera ábøtur á niðara part av Dvørgastígi.

Peningur er ikki avsettur á íløguætlan fyri 2007.

**Tekniska nevndin 10. mai 2007:** Nevndin samtykti at fáa gjørt meting av endurgjaldsspurninginum fyri tann partin av Dvørgastígi, ið er ognartikin.

- Borgarstjórin ynskir at viðgera málið í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 8. november 2007:** Nevndin samtykti at senda málið um møguliga vegaatkomu millum Heiðaveg og Varðagøtu til hoyringar í grannalagnum.

- Umsitingi hevur móttikið skriv frá borgarum í grannalagnum, sum vóru send nevndarlimunum undan fundinum.

**Tekniska nevnd 7. februar 2008:** Nevndin var á staðnum og kunnaði seg um málið.

Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal og Leivur Hansen, samtykti at eingin atkomuvegur verður gjørdur millum Heiðaveg og Dvørgastíg.
Ein minniluti, Sjúrður Olsen, mælir til at gera eitt skitsuppskot, sum tekur støði í at steingja Dvørgastíg frá Varðagøtu og at binda Dvørgastíg í Heiðaveg.
Ein samd nevnd samtykti at seta metingarnevnd at avgreiða endurgjalds-spurningin.

**Ískoyti:**
Eigarin av ovara parti av Dvørgastígi hevur lagt moldrúgvu uppi við endan av vegnum og hevur hetta ført við sær truplari atkomuviðurskifti hjá grannalagnum. Av terirri grund hevur formaðurin í nevndini ynskt at viðgjørt málið enn eina ferð. Umsitingin kunnar annars um gongdina í málinum.

**Tekniska nevnd 3. apríl 2008:** Kunnað varð um málið.

- Spurningurin viðv. moldrúgvuni er ikki loystur enn eins og tilgongdin av málinum um endurgjaldsspurningin er drigin eitt sindur út. Umsitingin kemur, saman við Julionnu Klett, sakførara, at greiða frá gongdini í málinum.

**Tekniska nevnd 7. oktober 2008:** Julianna Klett greiddi frá gongdini í málinum.

- Umsitingin kemur saman við løgfrøðingi at kunna um gongdina í málinum.

**Tekniska nevnd 5. mars 2009:** Julianna Klett greiddi frá gongdini í málinum.

- Umsitingin kemur saman við Julionnu Klett, sakførara, at greiða frá gongdini í málinum.

**Tekniska nevnd 3. september 2009:** Kunnað var um málið. Víst verður til j. nr. 2006-1323/61.

- Borgarstjórin ynskir at umrøða málið við nevndina.

**Tekniska nevnd 24. september 2009:** Málið umrøtt.

- Borgarstjórin ynskir at umrøða málið við nevndina.

**Tekniska nevnd 7. juni 2011:** Tikið av skrá.

- Skriv er komið frá Advokatskrivstovuni, dagf. 22. august 2011, við áheitan um fund viðvíkjandi umvæling av Dvørgastígi. Spurt verður um hvørjar ætlanir kommunan hevur viðvíkjandi dagføringini av vegnum, sum nú er yvirtikin. Kunnað verður annars um gongdina í málinum frá tí at málið um endurgjald av vegnum var kært til Landsrættin og eftirfylgjandi at býráðið avgjørdi at taka kæruna aftur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin vísa til tilmæli 10. mai 2007, ella at nevndin tekur støðu til dagføringina av Dvørgastígi, herundir umfangið av eini slíkari dagføring. Somuleiðis verður mælt til, at játtan verður raðfest á komandi íløguætlanum til at gera arbeiðið, uttan mun til hvørja loysn avgjørt verður at fremja.

**Tekniska nevnd 22. september 2011:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Borgarar hava gjørt vart við, at tað ríðir undan vegnum á vegamótinum oman fyri hjá Ottari Jacobsen, sála, og vísa á, at tørvur er á at dagføra vegin. Játtanin fyri árið 2012 til Dvørgastíg/undir Borgarhálsi álj. kr. 2 mió. er sett av til Borgarháls. Neyðugt er tí at útvega fígging til arbeiðið at dagføra Dvørgastíg.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin var á staðnum og kunnaði seg um viðurskiftini.

Nevndin samtykti, at umsitingin letur gera eitt skitsuuppskot við kostnaðarmeting av hvussu Dvørgastígur kann gerast tryggur, at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin ætlar at heita á ráðgeva um at útvega skitsuuppskot við kostnaðarmeting av hvussu Dvørgastígur kann gerast tryggur, at leggja fyri nevndina aftur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 250.000,- av íløgujáttanum til vegir 2013, kto. 8175, til at útvega skitsuuppskot við kostnaðarmeting av hvussu Dvørgastígur kann gerast tryggur, at leggja fyri nevndina aftur, og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 6. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykkir at beina málið aftur í teknisku nevnd við atliti til at útvega skitsuprojekt við kostnaðarmeting av, hvussu niðari partur av Dvørgastígi við ábótum kann gerast trygg farleið við nýggjari

atkomu frá Heiðavegi. Eisini samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 250.000 av íløgujáttanum til vegir 2013, kto. 8175 til endamálið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 21. februar 2013:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Halla Samuelsen og Marin Katrina Frýdal

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge og Jákup Dam.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá teknisku nevnd, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Greiddu ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

**27/13** **<u>1999-1642</u>**

**<u>Golfvøllurin</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Ætlanin er, at stórur partur av flagnum og undirliggjandi tilfar frá Tórsvølli skal flytast út á golføkið á Glyvursnesi. Tað verður Tórshavnar Golfklubbi, sum ger neyðugu fyrireikingarnar at taka ímóti nógva tilfarinum. Partur av hesum er at leggja dren, at javna økið og leggja onkran arbeiðsveg.

Í hesum sambandi søkir Golfklubburin um at leysgeva part av játtanini à 3,3 mió kr., sum felagið fekk í stuðli í 1999. Søkt verður um 250.000 kr. Sjálvt arbeiðið at leggja flagið verður gjørt vi sjálvbodnum arbeiði.

Útreiðslur í sambandi við flutning frá Tórsvølli verður fíggjað av Tórsvallar-verktætlanini. Í útboðstilfarinum skal lýsast neyvt, hvussu flag og tilfar skal fáast upp og leverast á Glyvursnesi, so at klubburin kann arbeiða hetta víðari.

Nevnda játtan á 3,3 mió er ikki beinleiðis tøk á fíggarætlanini, og rúm er ikki fyri játtanini á kontu 5370 Stuðul til íløgur. Hinvegin er játtan 5 mió kr. sett av á íløguætlanini til golfvøll. Av tí at hetta arbeiðið er at meta sum partur av nýggjum golfvølli, er skilabest, at stuðulin verður játtaður av hesi játtan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta Tórshavnar Golfklubba 250.000 kr. í stuðli til at gera fyrireikingar úti á Glyvursnesi at leggja flag og tilfar frá Tórsvølli av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 29. mars 2012:** Sambært nýggjari kostnaðarmeting verður fíggjartørvurin hjá felagnum til fyrireikingararbeiðið á Glyvursnesi 400.000 kr., og nevndin samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina at játta Tórshavnar Golfklubba upp til hesa upphædd av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Fíggjarnevndin 29. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at játta Tórshavnar Golfklubba upp til 400.000 kr. av konto 5775 Ítróttaranlegg.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt

**Ískoyti:**
Neyðugt er nú av álvara at seta gongd á fyrireikingarnar til golfbreyt á Glyvursnesi, skal breytin verða liðug í góðari tíð undan oyggjaleikum.

Gjørd er arbeiðsætlan, har eisini Tórshavnar Golfklubbi og Ítróttasamband Føroya taka lut í fyrireikandi arbeiðinum. Arbeiðið í hesum fyrsta stiginum fevnir serliga um at fáa avklárað lendisspurningin, um at menna konsept fyri sjálva golfbreytina bæði ítróttaliga, arkitektoniskt, umhvørvisliga (eitt nú burðardygg vatnveiting, flora v.m.), ferðavinnuliga og fíggjarliga, herundir skipan av rakstri, rakstrarætlan og møguleikar fyri eksternari íløgufígging, og um samstarv við útlendskar partar og serfrøði bæði í Skottlandi, Íslandi og Danmark, har fleiri viðkomandi sambond longu eru knýtt.

Annað áleikandi mál er, at ferðslan eftir vegnum frá Hamrinum og til golfvøllin á Glyvursnesi er nógv økt. Vegurin er tó í slíkum standi, at tað gevur teim koyrandi trupulleikar. Gjørd er kostnaðarmeting at fáa lagt avfresað asfalt eftir vegnum, og kemur hetta at kosta um kr. 50-75.000.

Á íløgukontu 5775 ítróttaranlegg eru kr. 4,6 mió tøkar til golfbreyt. Til tess at fáa fyrireikingarnar í gongd verður mett neyðugt við játtan kr. 500.000, harav játtan eisini kann verða brúkt til avfresa asfalt í mesta lagi upp til kr. 75.000.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 500.000 av kontu 5775 ítróttaranlegg til L57016 Golfvøllur ætlað omanfyri nevndu endamálum.

**Mentamálanevndin 10. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært roknskaparkunngerðini, sum fekk gildi fyri Tórshavnar kommunu 1. januar 2010, skulu tilsagnir um stuðul rakstrarførast í tí ári, tær eru latnar, og upphæddin skal innroknast sum ein skylda í ársroknskapinum. Í grannskoðaraprotokollini fyri ársroknskapin hjá kommununi fyri árið 2011 er tann viðmerking, at játtanin í hesum máli kr. 3,3 mió kr. á kontu 5370 Stuðul til íløgur er ikki innroknað í roknskapin, men einans upplýst sum skylda.

Grannskoðaraprotokollin mælir til, at omanfyri nevnda tilsøgn, sum er frá 1999, verður viðgjørd av nýggjum.

Stuðulin var í síni tíð játtaður felagnum til at byggja ein golfvøll ovaliga í Hoyvík. Henda ætlan er ikki longur aktuel. Hinvegin hevur býráðið sett í gongd verkætlan at fyrireika og byggja golfvøll á Glyvursnesi, sí kontu 5775 Ítróttaranlegg L57016 Golfvøllur. Vísandi til, at upprunatilsøgnin 3,3 mió vórðu ætlaðar til golfvøll, verður mælt til, at henda játtanin verður broytt og játtað til aktuellu verkætlanina á Glyvursnesi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at broyta tilsøgnina um stuðul kr. 3,3 mió soleiðis, at upphæddin verður játtað til kontu 5775 L57016 Golfvøllur.

**Mentamálanevndin 17. desember 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. januar 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 24. januar 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 21. februar 2013:** Einmælt samtykt.

**FUNDUR LOKIN KL. 20:40**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Elin Lindenskov | Bjørghild Djurhuus |
| Helena Dam á Neystabø | Sigrún Mohr | Tróndur Sigurdsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andresen | Annfinn Brekkstein |
| Sjúrður Olsen | Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |
| | Heðin Mortensen | |